# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føroya Shell:

## Læt starvsfólkum rósur



*Starvsfólk hjá Føroya Shell fáa rósur, f.v.: Simona Johannesen, Palli Petersen, Sveinbjørn Jacobsen, og Tórður Poulsen, sum varð ein kosin "Ársins Shell rósa" og Peter Qvortrup Geisling. Sørin Christiansen vantar á myndini*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Fríggjakvøldið helt kendi danski sjónvarpslæknin, Peter Qvortrup Geisling, fyrilestur fyri starvsfólkunum hjá Føroya Shell í høllini á Føroya Lærarskúla. Fimm av starvsfólkunum fingur rósur, harav ein varð kosin "Ársins Shell rósa"**

Føroya Shell hevði boðið sínum starvsfólkum við maka og øðrum til fyrilestur hjá kenda danska sjónvarpslæknanum Peter Qvortrup Geisling í høllini á Føroya Lærarskúla fríggjakvøldið 17. juni.

Á ein áhugaverdan hátt, við bæði skemti og álvara, dugdi Peter Qvortrup Geisling sera væl at fáa áhoyrararnar við. Hann segði m.a. frá ymiskum, hann hevði verið úti fyri í sínum starvi sum lækni og frá brøvum og teldupostum, hann hevði fingið. Hann svaraði eisini spurningum, og kom m.a. inn á hvussu strongd ávirkar okkara dagligdag, og hvat vit kunnu gera fyri at fyribyrgja tí.

Peter Qvortrup Geisling er eisini kendur fyri at geva blómur til tey, sum hava uppiborið eitt herðaklapp, og her var einki undantak. Starvsfólkini hjá Føroya Shell høvdu kosið "Ársins Shell rósu", og varð tað Tórður Poulsen,sum starvast á Viðarnesi í Havn, sum fekk hendan heiður. Grundgevingarnar vóru m.a. at hann er "trofast i tjeneste, pålidelig og arbejdsom og helt sikkert den flinkeste person på Viðarnes" segði læknin Peter Qvortrup Geisling. Fýra onnur starvsfólk vóru eisini heiðraði við blómum, tey vóru: Simona Johannesen, sum starvast á Shellstøðini í Gøtudali, Palli Petersen, Sørin Christiansen og Sveinbjørn Jacobsen, sum allir starvast á Viðarnesi í Havn.

## Andlát og jarðarferðir

Ásvør Árting andaðist á Láargarði hósdagin 16. juni, 75 ára gomul. Jarðarferðin var úr Vesturkirkjuni mánadagin klokkan 13:00. Tey, ið vilja minnast Ásvør, kunnu lata Alsheimerfelagnum eina peningagávu, konto í peningstovnunum.

Frida Winther, Vágur, andaðist á Suðuroyar ellis- og røktarheimi fríggjadagin, 93 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsið týsdagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Vágs kirju mikudagin klokkan 13:00. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnst Fridu, kunnu lata Suðuroyar ellis- og røkarheimi eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

Anna Houmann úr Oyndarfirði andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin, 88 ára gomul. Jarðarferðin var úr Oyndarfjarðar kirkju mánadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Onnu kunnu lata Oyndarfjarðar kirkju eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

*Kelda: Útvarp Føroya*

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## M.C. Restorff á ferð í Grønlandi

**Kristiliga kringvarpsstøðin Lindin kemur nú við einari nýggjari sending, sum ber heitið "M.C. á ferð". Í summar og út á heystið eru frásagnirnar úr Grønlandi, hagar M.C. og konan, Mariann, eru flutt í arbeiðsørindum**



*Tríggir av manningini umborð á trúboðanarbátinum Juvel, sum vitjar Norðurgrønland í summar: f.v.: Óli Steinberg úr Klakvík, M.C. Restorff úr Havn, og Herman Mørkøre av Eiði.*

M.C. Restorff sigur í tíðindaskrivi at konan, Mariann, og hann komu til Grønlands 2.juni, og tað hevur verið ein fantastisk uppliving higartil.

"Tað kom kanska ikki heilt óvart á meg at hjúnafelagin, sum er útbúgvin sjúkrasystir og hevur hollar royndir innan sjúkrarøkt, søkti og fekk eitt avloysarastarv á sjúkrahúsinum í Sisimiut - ella Holsteinsborg, sum býurin eisini hevur verið nevndur. Mariann hevð onkuntíð borið upp á mál at royna seg aðrastaðir enn í Føroyum - um tað kom at liggja fyri. Og nú var so hin lagaliga løtan", sigur M.C.

Meðan Mariann er til arbeiðis á sjúkrahúsinum, arbeiðir M.C. við at gera útvarp, og eftir ætlan byrjar Lindin at senda "M.C. á ferð" týsdagin 21. juni. Nýggja sendingin avloysir "Duettina", sum nú er farin í summarfrí.

"Konan ætlaði kanska at leggja meg upp á ís" sigur ein læandi M.C. "men nú vit eru komin til Grønlands, er kavin næstan horvin. Summarið er byrjað...um enn nakað seinkað. Heitt er í sólini, men lotar hann av norðuri, og tú gongur í skugganum, er bítandi kalt. Vit lata okkum í eftir umstøðunum, men nógv av teimum grønlandsku børnunum ganga og hosta meðan snorið rennur úr nøsini".

"Tær fyrstu tríggjar sendingarnar eru "undansendingar"... t.v.s. hendingar á leiðini í døgunum beint áðrenn fráferðina úr Føroyum hin 19.mai til vit settust í risaflogfarið hjá grønlandsfly í Kastrup hin 2. juni" sigur M.C.

Undansendingarnar vera hesar: Fyrsta sendingin "M.C. á ferð" verður send týsdagin 21. juni kl.15: (í Føroyum og umborð á Norrønu), onnur sending: 5. juli (millum føroyingar og grønlendingar í Jútlandi), triðja sending: 19. juli (millum føroyingar og danir á Sælandi), fjórða sending: 2. august (á flogi og í Grønlandi) fimta sending: 16. august og í heyst: ( fleiri ferðafrásagnir úr risastóra landinum).

Allar sendingarnar vera sendar týsdag kl. 15 og endursendar mikukvøld kl. 23.

Móttøka

40 ára starvsdagur



Sosialurin 341800

Í sambandi við 40 ára starvsdagin hjá Tórbjørn Petersen, verður móttøka á Smyrilsvegi 8 hjá P/F Maria Poulsen

**mikudagin 22. juni frá kl. 15-17**

Tað hevði glett okkum at sæð vinir, kenningar, starvsfelagar og viðskiftafólk

**pf Maria Poulsen & Co.**